


# LÆRLINGUR TIL SØLUDEILDINA

**Hevur tú áhuga í sølu og ráðgeving innan ferðavinnu? Kundi tú hugsað tær at fingið eina spennandi útbúgving innan ferðavinnuyrkið? So er hetta kanska títt dreymalærupláss.**

### VIT BJÓÐA

Vit bjóða tær eina útbúgving við møguleikum og avbjóðingum í einari dynamiskari fyritøku, har vit lyfta í felag fyri at røkka okkara málum. Tú verður partur av einum spennandi arbeiðsplássi á søludeildini, har tú lærir um sølu, kundatænastu, vørumenning, bókhald, kundatænastu, sølu til ferðaskrivstovur o.m.a.

### UM TEG

Vit vænta, at tú hevur HH-, HF- ella studentsprógv, góðan málkunnleika í føroyskum, enskum og norðurlenskum, hevur góðan teldukunnleika, dugir væl við fólki og arbeiðir skjótt og sjálvstøðugt. Tú ert sjálvandi til reiðar at læra nógv og vilt lyfta í felagsskapi, soleiðis sum vit gera á Smyril Line.

### UMSÓKNIR

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at senda okkum eina umsókn við teldubrævi til annika@smyrilline.fo. Freistin at søkja er 20. juni. Hevur tú spurningar, ring til okkara á telefon 345900 og spyr eftir Anniku Larsen Black, søluleiðara.

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

**Freistin at søkja er 20. juni**

**WWW.SMYRILLINE.FO**

SENDISTOVAN

# Leiðari til Corporate Finance deildina hjá Føroya Banka



**Leiðarin á Corporate Finance deild bankans seinastu árini hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum í bankanum. Vit sóknast tí eftir nýggjum leiðara til deildina.**

**Hevur tú neyðugu royndirnar og førleikarnar, er tað kanska tær, ið vit leita eftir.**

### Ábyrgdarøkið

Sum leiðari stendur tú á odda fyri og myndar Corporate Finance deildina. Deildin veitir ráðgevaratænastur í sambandi við millum annað:

- Keyp, sølu og samanlegging av fyritøkum
- Kapitalveiting og samanseting av fígging
- Skráseting av fyritøkum á virðisbrævamarknaði

Ráðgevarnir á deildini virka sum tilgongdarstýrarar, sum fáa til vegar neyðugar greiningar og upplýsingar fyri kundar bankans.

Á Corporate Finance deildini starvast trý fólk, íroknað leiðaran. Leiðarin fær tilvísing til stjórn bankans.

### Yrkisførleikar

Talan er um starv á leiðslustigi, ið krevur hægri útbúgving í eitt nú virkis- og handilsleiðslu, roknskapi ella løgfrøði. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur leiðsluroyndir frá líknandi starvi.

Talan er um norðurlendskt virkisøki, og tú mást vænta ávísa nøgd av ferðing. Vit vænta, at tú kanst samskifta í skrift og talu á enskum og donskum, og at tú hevur góðan kunnleika til onnur norðurlendsk mál.

### Persónligir førleikar

Sum persónur ert tú fyrikomandi, opin, kreativur, virkisfúsur og hevur hug at fremja gott samstarv.

Vit vænta, at tú megnar at taka ímóti avbjóðingum í einum altjóða umhvørvi, at tú dugir at motivera, og at tú hevur evnini at samráðast tvørtur um landafrøðilig og mentanarlig mørk.

Sum leiðari fyri corporate finance ert tú samstundis leiðandi corporate finance ráðgevi. Tú skalt hava hegni at seta teg inn í strategiska tørvin hjá kundunum, og tú mást hava dirvi og orku til at ganga á odda, tá ráðgevarauppgávur skulu loysast – ofta við stuttum skotbrái.

### Vit bjóða

Eitt spennandi og avbjóðandi starv í einum altjóða umhvørvi, har ið virkismentanin er grundað á bankans kjarnuvirðir, sum eru dugnasemi, eldhugi og framsøkni.

Starvið gevur góðan møguleika fyri fakligari og persónligari menning. Løn og setanartreytir verða ásett eftir royndum og førleikum.

### Umsókn

Send tína umsókn skjótast gjørligt saman við lívsrensli og viðkomandi skjølum til
Føroya Banka
Húsagøtu 3
Postrúm 3048
FO 110 Tórshavn
ella starvsfolk@foroya.fo.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Súna Schwartz Jacobsen, ssj@foroya.fo, John Rajani, jr@foroya.fo, ella við at ringja á telefon +298 330330.

Umsóknin skal merkjast *»Leiðari til Corporate Finance«* og skal vera bankanum í hendi í seinasta lagi **24. juni 2010**. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

FØROYABANKI

SENDISTOVAN